# Hósdagur 10. oktober

**SVF**

17.30 Viftan
18.00 Toktummas 12
18.05 Pocahontas 23:26
18.30 Atlantis High 6:13
19.00 Jón - 8 ár e
20.00 Dagur og Vika
20.25 Grannar okkara
20.50 Gesturin
21.15 Læknin hevur orðið
21.45 Krimitímin: Burturi á heiðini 3:3
22.35 Borð um borð e
23.25 Liðugt

**EUROSPORT**

7.30 Golf - Challenge Tour Charles Church Championship Bowood United Kingdom
8.00 Golf - U.S. P.G.A. Tour Michelob Championship Williamsburg United States
9.00 Sailing - Sailing World
9.30 Motorsports - Series
10.00 LG Super Racing Weekend™ - LG Super Racing Weekend™ Magazine
10.30 Rally - World Championship New Zealand
11.30 Tennis - ATP Tournament Lyon France - Live
13.00 Cycling - Road World Championship Belgium Zolder - Live
16.00 Tennis - ATP Tournament Vienna Austria - Live
17.30 Tennis - ATP Tournament Vienna Austria - Live
19.00 Sailing - Louis Vuitton Cup New Zealand Auckland
20.00 Football - Friendly Match - Live
22.00 News - Eurosportnews Report
22.15 Formula 1 - Inside Formula
22.45 Superbike - Superbike MAG
23.15 Cycling - Road World Championship Belgium Zolder
0.15 News - Eurosportnews Report

**BBC PRIME**

0.00 TLZ: »A History of British Art – North & South«
1.00 TLZ: »Movers and Shakers«
1.30 TLZ: »Jonathan Miller's Opera Works – The Recitative«
2.15 TLZ: »Jonathan Miller's Opera Works – The Death Scene«
3.00 TLZ: »Computing for the Terrified – Cross Words«
3.30 TLZ: »Bindi Millionaires – Raags to Riches«
4.00 TLZ: »Renaissance Secrets – Riddle of the Dome«
4.30 TLZ: »What Workers Want«
5.00 TLZ: »Greek Language and People – Meeting People«
5.30 Look Ahead
6.00 Step Inside: »Scraps«
6.10 The Story Makers: »Ballons«
6.30 Joshua Jones: »Boomer«
6.40 VIP: »Liverpool«
7.05 50/
7.30 Ready Steady Cook
8.15 House Invaders: »Kettering«
8.45 Going for a Song
9.15 The Antiques Show
9.45 Changing Rooms
10.15 Vets to the Rescue
10.45 Lovejoy: »Day of Reckoning«
11.45 The Weakest Link
12.30 Passport to the Sun
13.00 Eastenders
13.30 House Invaders: »Moseley«
14.00 Going for a Song
14.30 Step Inside: »Scraps«
14.40 The Story Makers: »Ballons«
15.00 Joshua Jones: »Boomer«
15.10 VIP: »Liverpool«
15.35 50/
16.00 Barking Mad
16.30 Ready Steady Cook
17.15 The Weakest Link
18.00 Gardeners' World
18.30 Ground Force: »Brotherton«
19.00 Eastenders
19.30 Dog Eat Dog
20.15 Parkinson Shorts: »David Beckham«
20.30 People like us: »The Airline Pilot«
21.00 The Blackadder: »Witchsmeller Pursuivant«
21.30 French and Saunders
22.00 Attachments: »Flat Management«
23.00 Cardiac Arrest: »Welcome to the House of Pain«
23.30 Cardiac Arrest: »Doctors and Nurses«

**BBC WORLD**

00:00 BBC News
00:30 HARDtalk (r)
01:00 BBC News
01:30 Fast Track (r)
01:45 Holiday (r)
02:00 BBC News
02:30 Africa Direct (r)
03:00 BBC News
03:30 Asia Today (r)
03:45 World Business Report (r)
04:00 BBC News
04:30 HARDtalk
05:00 BBC News
05:30 World Business Report
06:00 BBC News
06:30 World Business Report
07:00 BBC News
07:30 World Business Report
07:45 Sport Today
08:00 BBC News
08:30 Fast Track (r)
08:45 Holiday (r)
09:00 BBC News
09:30 HARDtalk (r)
10:00 BBC News
10:30 Africa Direct (r)
11:00 BBC News
11:30 Asia Today
11:45 World Business Report
12:00 BBC News
12:30 HARDtalk (r)
13:00 BBC News
13:30 World Business Report
13:45 Sport Today
14:00 BBC News
14:30 The Car's The Star (r)
15:00 BBC News
15:30 Asia Today
16:00 BBC News
16:30 HARDtalk (r)
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Talking Movies (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Click Online
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Life
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

**TV3**

05:00 Garfield Og Venner
05:25 Børnehjørnet
07:00 Tv-Shop
08:35 Tv3 Extra
09:05 Familien Walton
10:05 Familien Walton
11:00 Horton-Sagaen
11:55 Horton-Sagaen
12:50 Ricki Lake
13:45 Ulvehunden 2
15:35 Med På Moden
16:05 Ricki Lake
17:00 Alle Elsker Raymond
17:30 Sabrina - Skolens Heks
18:00 Alle Tiders Barnepige
18:30 Tv3 Extra
19:00 Dawsons Creek
19:50 Den Eneste Ene
20:50 Sex And The City
21:30 Mysterious Ways
22:30 Line's
23:30 Tv3 Extra
00:00 Strømer I L.A.
00:30 Simpsons
01:00 Træneren
01:30 Kodenavn Nikita
02:25 Sunset Beach
03:15 Sunset Beach
04:05 Benny Hill
04:40 Godnat

**ÚF**

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur
07.15 Barnaløtan - Katrin og Kári stíla fyri
07.30 Tíðindi
07.35 Góðan morgun Føroyar
08.00 Tíðindi
08.03 Góðan morgun Føroyar
09.00 Tíðindi
09.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
09.35 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e)
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 1
10.10 Tit skriva, vit spæla
11.00 Tíðindi
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Fimmarin (e) - Jóhann Mortensen leggur til rættis
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt
16.00 Tíðindi
16.03 Í víngarðinum
17.00 Tíðindi
17.05 Viðurgerði - Sending við reportasjum, samrøðum og frásagnum úr Suðuroy.
18.00 Barnaløtan (e) - Katrin og Kári stíla fyri
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Skiftissiðir á lívsleiðini - Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Crescendo - Kári Olsen stílar fyri
20.30 David Copperfield - Elin Heinesen lesur fjórða part av framhaldssøgu eftir Charles Dickens. Jens Pauli Heinesen týddi.
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Femja Petersen leggur til rættis
22.00 Tíðindi
22.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
23.00 Tíðindi

## Gesturin (Dánjal Andreasen)




Tá man spælir móti mætum fótbóltstjóðum sum Týsklandi, so er sjálvandi altíð vandi fyri stórtapi. Í aðrar mátar er dysturin móti varaheimsmeistarunum hinvegin ein kærkomin fongur hjá føroyska fótbóltssambandinum. Dysturin gevur fitt av inntøkum, og tær eru altavgerandi fyri menningina av føroyskum fótbólti. Formaðurin í FSF, Dánjal Andreasen er gesturin í sendingini, og Ivan Niclasen prátar við hann um hvussu føroyskur fótbóltur sær út um 5 ár, hvussu nógv lið eiga at vera í fyrstu deild og um hví teir júst valdu Henrik Larsen til landsliðsvenjara.

## Sex and the City (56)

Hóskvøldið kl. 20.50

Carrie gerst frá sær sjálvari, tá teldan hjá henni gongur fyri. Hon sigur, at tað kennist sum um alt hennara lív liggur á telduni. Aidan keypir henni eina nýggja teldu við zip drive, og hetta ger Carrie upp aftur óðari, tí hon heldur, at hann blandar seg ov nógv. Hetta ger, at Aidan eisini gerst óður, tí hann heldur ikki, at Carrie vil lova honum at vera ein partur av hennara lívi....



## Morgunlestrar

7.–12. oktober

***Jógvan Fríðriksson, prestur, lesur***

**Sálmar:**
**Mánadagin 7. oktober:**
nr 541 "Nú hvítna tindar fjøllum á"

**Týsdagin 8. oktober:**
nr. 526 "Góðska tín, Guð, er altíð góð"
nr. 357 "Guð, tú tín akur má signa og verja"

**Mikudagin 9. oktober:**
nr. 520 "Sólin hevur sama lag"
nr. 134 "Rita navn títt mær í hjarta"

**Hósdagin 10. oktober:**
nr. 589 "Vár Guð, sum lívgar fjøll og fjørð"

**Fríggjadagin 11. oktober:**
nr. 586 "Guð, tú sum øllum býður"

**Leygardagin 12. oktober:**
nr. 590 "Vár Guð er verja og verndin góð"
nr. 544 "Tíðin rennur sum streymur í á"

**Rás 2**

09:45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
10:00 Politiskur Pallur (e) - Endursending frá í gjár. Hesaferð við Fólkaflokkinum. Sonne Smith leggur til rættis.
11:00 Tónleikur
12:00 Tíðindi
12:15 Tónleikur
13:00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum. Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan (framhald)
15:00 Tíðindi
15:15 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík. John William og Oliver Joensen leggja til rættis.
16:00 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur. Sonne Smith leggur til rættis.
17:00 Indie - Bylgjan - Tónleikasending sum Rúni Korsgaard leggur til rættis
18:00 Tíðindi
18:15 Tónleikur
19:00 Orð á leiðini (EvR) - Evni: Andaligur búnaðskapur (6. partur av 8) Jógvan Zachariassen leggur til rættis.
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi
21:15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun. Bíbliulestur v/ Anju Hansen.
21:30 Tónleikur
22:00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
00:00 Liðugt

**Lindin**

13.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H. Spurgeon
13.15 Sjólívið v/ Malmberg Olsen
15.00 Horizon Star v/ Stella Zachariassen
16.00 Sjómanssendingin Vitin v/ M. C. Restorff (e)
17.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
19.15 Tónleikur
20.00 Barnalindin (e)
20.55 Bankabók Trúarinnar - eftir C.H. Spurgeon (e)
21.00 Bønarlinjan, beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana
Bønarevnu kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379.
00.00 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti (e)
23.10 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
02.00 Ein forvitnislig ferð gjøgnum Bíbliuna v/ Símun Absalonsen gestur Jógvan Zachariassen
03.00 Blandaður tónleikur, Dagsins Orð, o.a.
06.00 vit gevast

ítróttur

Nr. 190 • fríggjadagur • 4. oktober 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Einki avgjørt

Fyrri dysturin millum NSÍ og B68 um, hvør skal spæla í 2. deild næsta ár, varð leiktur mikukvøldið. NSÍ vann í spennandi dysti 3-2.

Eftir fyrra dystin millum liðini bæði tykist sostatt einki at vera avgjørt, og lagt er upp til ein spennandi dyst, tá NSÍ leygardagin vitjar út á Toftir.

NSÍ vann dystin 3-2 eftir hálvleikstøðuna 2-1 til B68. Aksel Højgaard, sum enn ikki hevur lagt skógvarnar á hilluna, legði B68 á odda í fyrra hálvleiki. Bjarki Danielsen javnaði fyri NSÍ, men áðrenn hálvleik fekk Mannbjørn Nesá lagt B68 fram um aftur.

Seinni hálvleikur var ikki meiri enn byrjaður, tá Dan Knudsen javnaði fyri NSÍ og móti endanum skoraði Jóhan Petur Poulsen til endaligu støðuna 3-2 til NSÍ.

*-bn*

**Fyrri dystur um hvør skal spæla í 2. deild næsta ár.**
**NSÍ - B68 3-2(1-2)**
0-1: Aksel Højgaard
1-1: Bjarki Danielsen
1-2: Mannbjørn Nesá
2-2: Dan Knudsen
3-2: Jóhan Petur Poulsen

# Todi heldur seg ikki skylda FCK nakað

**Leiðslan í FCK hevur givið føroyska álopsspælaranum eitt tilboð um framhaldandi samstarv, men Todi ivast í, um hann skal skriva undir, ella um hann kanska skal leita aðrar vegir**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*



*Todi Jónsson umhugsar í løtuni tilboð um nýggjan sáttmála frá leiðsluni í FCK. Tilveran í beinkinum er lítið lokkandi, og tí er møguleiki fyri, at føroyski álopsmaðurin fer at leita sær heilt aðrar leiðir komandi kappingarár*

FCK spælararnir og leiðslan í felagnum hava í hesi vikuni verið í Stokhólmi. Í gjárkvøldið varð UEFA Cup dysturin ímóti Djurgården spældur. Hvussu tað hilnaðist, venda vit aftur til í morgin.

Todi Jónsson hevur verið við FCK í svenska høvuðsstaðnum. Og umframt dystin hevur Todi hugsað um, hvussu tað verður við fótbóltsframtíðini hjá honum. Sáttmálaskeiðið við FCK verður runnið 1. juli komandi ár, og leiðslan í FCK hevur sagt Toda, at teir fegnir vilja hava, at hann heldur fram í felagnum. Teir hava givið honum eitt sáttmálauppskot.

Todi hevur ikki skrivað undir, og hann ivast í, um hann yvirhøvur skal skriva undir eina nýggja avtalu við FCK:

– Eg ivist rættuliga nógv í, hvussu tað skal verða. Eg eri fegin um at vera í felagnum, men tá framtíðar fótbóltslívið skal leggjast til rættis, spælir tað eisini inn, at eg fegin vil vera á vøllinum og ikki á beinkinum. Eg tyggi upp á tilboðið frá FCK, men eg veit satt at siga ikki enn, um eg fari at skriva undir.

Hóast teir í FCK leiðsluni fegnir vilja hava Toda at halda fram í felagnum, so kunnu teir sjálvandi ikki geva honum lyfti um, at hann verður fastur maður á liðnum. Sum kunnugt so hevur Todi síðani summarsteðgin kappast við tríggjar aðrar spælarar um tey bæði fremstu plássini. Sum tað hevur sæð út síðstu vikurnar, so eru Zuma og svenski Jörgen Pettersson fremstu evnini til álopsplássini, og so kappast Todi og Peter Møller um at vera triði maðurin. Men tað kann vera so skjótt, at sovorðið koppar ein veg ella annan.

Hóast Todi er fegin um at vera í FCK, so heldur hann ikki, at hann á nakran hátt stendur í skuld til felagið, sum hann síðani á sumri í 1997 hevur spælt fleiri dystir fyri enn nakar annar útlendskur spælari.

– Sáttmálasamráðingar snúgva seg sjálvandi eisini um pengar. Men eg ynski ikki at siga nakað um, hvat hugsanirnar hjá mær ganga út uppá, segði Todi Jónsson við tíðindastovuna Ritzau mikukvøldið.

Todi er 30 ára gamalur, og hann verður 31 á kyndilsmessu, sum er 2. februar. Ítróttarstjórin í FCK, Niels Christian Holmstrøm segði seg fyri tveimum vikum síðani vóna, at allar sáttmálasamráðingarnar vóru loknar, tá oktober mánaði var liðugur. Umframt Toda Jónsson eru tað fimm aðrir FCK spælarar, sum hava sáttmála við FCK, inntil hetta kappingarárið er liðugt.

Um spælararnir ikki hava undirskrivað nýggja avtalu við FCK á nýggjárinum, so verður møguleiki hjá teimum at samráðast við onnur feløg um samstarv eftir 1. juli, uttan at samráðingarnar nýtast at skula ganga fyri seg ígjøgnum FCK leiðsluna.

Niels Christian Holmstrøm segði fyri tveimum vikum síðani, at hann heldur, at teir í felagnum fara væl við fólkinum, og at teir rokna við, at spælararnir eru loyalir ímóti FCK. Kanska var tað ein hóttan ímóti Toda og hinum spælarunum, sum eru í sáttmálasamráðingum, tá ítróttarstjórin segði við danskar fjølmiðlar, at um spælararnir ikki ætla sær at halda fram í FCK, so fer tað at síggjast aftur.

Fjølmiðlarnir mintust aftur á, tá ein spælari, Kim Madsen, í fjør ikki vildi skriva undir nýggjan sáttmála, men í staðin dúvaði uppá at sleppa til Týskalands at spæla. Tað eydnaðist honum, men síðstu mánaðirnar, sum hann var FCK spælari, var hann so at siga bara á beinkinum.